# Starvsfólk til KT-deildina á Føroya Tele

"at læra uttan at hugsan er burturspilt arbeiði – at hugsa uttan at læra er vandamikið"

- Konfusius -



**Føroya Tele er fremsta KST fyritøka í Føroyum. Felagið er eitt samtak av einum móðurfelag og trimum dótturfeløgum. KT-deildin er partur av móðurfelagnum og hevur ábyrgd av viðlíkahaldi og menning av felags KT-skipanum og virkisloysnum.**

Arbeiðið á KT-Deildini fevnir um alla menningargongdina frá hugskoti, tilevning og íverkseting til viðlíkahald. Amboðini eru fyri tað mesta partur av Oracle-umhvørvinum, herundir:

- Oracle Forms, Reports, PL/SQL.
- JDeveloper, Java og ADF.
- Oracle Enterprise Server og Workflow

Harafturat verða onnur amboð brúkt, so sum:

- Microsoft Visual Studio.NET
- Perl
- Postgres

Skipanirnar koyra í einum Unix/Linux umhvørvi, sum er knýtt at Oracle ERP skipanini.

KT-deildin leitar eftir starvsfólki, sum kann vera við í hópinum. Umsøkjari má hava viðkomandi útbúgving, so sum verkfrøðingur, dátufrøðingur og/ella cand.merc.dat. Royndir innan nevndu tøknir eru ein fyrimunur. Tann, ið sett/-ur verður, má vera eldhugað/-ur og dáma væl at arbeiða í verkætlanarbólkum og samskifta við allar partar í samtakinum. Arbeitt verður í einari nútímans og motiverandi organisatión, við spennandi fakligum avbjóðingum, í eini deild við blíðum og fyrikomandi fólki, har fleksibilitetur og ábyrgd fylgjast. Lønin er kappingarfør, og møguleiki er fyri fleksiblari arbeiðstíð.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Michael Thomsen, KT-leiðara, á tel 30 30 30.

Umsóknir skulu vera FøroyaTele í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 18. mai 2007 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

Føroya Tele er fremsta KST fyritøka í Føroyum. Felagið er eitt samtak av einum móðurfelag og trimum dótturfeløgum. KT-deildin er partur av móðurfelagnum. Á Føroya Tele eru 235 fulltíðarstørv.

FØROYATELE
Skapið framtíðina saman við okkum!


